Álit

í

løgtingsmáli nr. 94/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um pantskipan fyri íløt (Ásetan av panti og rakstrargjaldi, tá skjalprógv vantar frá innflytara ella framleiðara)

Eyðdis Hartmann Niclasen, landsstýriskvinna í heilsu- og orkumálum, hevur lagt málið fram 24. apríl 2026, og eftir 1. viðgerð tann 28. apríl 2026 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 30. apríl og 11. mai 2026.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Poul Michelsen heilsølu, Føroya Bjór, IRF, landsstýrismannin í fíggjarmálum, Aksel V. Johannesen, saman við TAKS og landsstýriskvinnuna í heilsu- og orkumálum, Eyðdis Hartmann Niclasen.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

IRF mennir í løtuni eina nýggja pantskipan, sum væntandi kemur í drift í heyst. Í arbeiðinum at menna hesa, er IRF komið eftir, at tær upplýsingar, ið TAKS kann veita í samband við innflutning, ikki eru nóg neyvar til at seta pant og rakstrargjald eftir.

Fyri at tryggja, at ov lítið ikki verður goldið í panti, gevur henda lógarbroyting heimild til at krevja pant eftir hægra talinum, ið TAKS fær upplýst frá innflytara - litrar ella vekt -, um so er, at innflytarin ikki upplýsir tal av íløtum.

Mett verður, at hetta verður smidligari fyri innflytarar og lættir um hjá IRF, og vil í síðsta enda føra við sær, at meira verður endurvunnið.

Umhvørvisstovan, sum higartil hevur skulað havt eftirlit við innfluttum íløtum, verður ikki longur partur av skipanini, og verður kunngerðin, sum í løtuni ásetur, at Umhvørvisstovan skal hava upplýsingar á økinum, sett úr gildi, samstundis sum henda lógarbroytingin verður samtykt.

Heitt verður á landstýrisfólkið um at bera so í bandi, at tær reglar, ið landstýrisfólkið setur sambært § 4, stk. 2, taka atlit til vinnuna og brúkararnar av skipanini, soleiðis at krøvini ikki leggja óneyðugar byrðar á hesar partar.

Við hesum viðmerkingum tekur nevndin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 12. mai 2026

Ben Arabo formaður	Atli F. Johansen næstformaður	Fía Selma Nielsen
Erhard Joensen	Árni Skaale	Eirikur í Jákupsstovu
	Steffan Klein Poulsen	